


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Prísurin fyri at mangla lykilin



BJØRT SAMUELSEN
Tjóðveldi

Sambandsinnaði rokna dúgliga uppá, hvat tað higartil hevur kostað okkum, at blokkurin varð skorin niður við einum triðingi. Men tølini fyri okkara búskap sýna heilt greitt, at blokkniðurskurðurin ikki hevur havt nakra neiliga ávirkan á búskapin, tvørturímóti.

**Prísurin fyri not to be**
Eitt munandi meira áhugavert roknistykki er, hvat tað kostar okkum, ikki at taka fulla ábyrgd av landi okkara.

Hvat kostar tað, at vit ikki hava atgongd til evropeiska búskaparliga samstarvið – EBS? EBS-avtalan var fyri Ísland lykilin til búskaparligan vøkstur og menning. Men ein slíkan lykil hava vit ikki, tí EBS-limaskapur er einans fyri sjálvstøðug lond. Hvat kostar tað okkum, at vit ikki kunnu "branda" okkum sum eitt land og harvið ikki hava møguleikan og rætt til at vera eins sjónlig og hini – og eitt nú at vinda Merkið á stong saman við øðrum fløggum í ST, og luttaka í fjøltáttaða samstarvinum har.

Sum hjáland eru vit hvørki Danmark og ei heldur eitt veruligt land - Føroyar. Tí detta vit beint niðurímillum og hava ikki somu møguleikar sum hini at vera við.

**Lykil krevst**
Nei, hetta snýr seg ikki um tjóðskaparromantiskar kenslur. Hetta snýr seg um, at heimurin í dag er knýttur saman í ein sínámillum treytaðan felagsskap. Og í hesum felagsskapi ræður um at vera sjónlig og at luttaka.

Sum sjálvstøðug tjóð hava vit nógv betri møguleikar at branda okkara vørur – fisk, tónleik, design v.m. Og vit fáa lykilin til altjóða samstarv – politiskt, vinnuliga og mentanarliga.

Eg fari tí at heita á teg um at atkvøða fyri teimum, sum trúgva uppá, at við fullari ábyrgd og í tøttum samstarvi við aðrar tjóðir - er framtíðin bjørt!

# Javnstøða og børnini



ERLA BERGHAMAR SØRENSEN
Fólkaflokkurin

Neyvan eri eg tann einasta, sum eri so deyðatroytt av øllum javnstøðutosinum. Tað er so galið, at sjómannafelögini nærum ikki fáa verið til, tí tey at kalla bara umboða annað kynið.

So illa stendur til við javnstøðuni í fólkaræðinum, at konufólk skulu bæði rekast, berast og sleipast inn á ting. Flestøll konufólk kenna seg noydd at velja konufólk – og kanska mannfólkini við. Men tú kanst hvørki noyða fólk at stilla upp ella at verða vald á ting.

Havi ongantíð kent meg aftur í vantandi javnstøðuni, sum fólk gremja seg um. Veit einki um, at konufólk ikki sleppa framat, har tær vilja. Haldi tað vera lítið hugaligt, at tosað verður í fullum álvara um at seta ódemokratisk tiltøk í verk fyri at fremja javnstøðuna. Javnstøða millum kynini hevur lyndi til at verða sett fram um fólkaræðið, og tað er ódámligt.

**Vit fáa fleiri børn enn onnur**
Vit skulu ikki gloyma, at barnatalið er størri í Føroyum enn í londunum rundan um okkum. Kanska er tað ein orsøk til, at konufólk taka minni lut í politikki. Nógv konufólk hava ríkiligt við at reka sín egna 'heimapolitikk' umframt borgarliga starvið.

Børn krevja umsorgan. Kanska skuldu vit í størri mun lagt dent á at givið smábarnamammum frið og umstøður til at taka sær av tí mest týðandi: teirra egnu børnum – heldur enn at trýsta tær til at stremba eftir hægri størvum og politiskum virksemi. Latið hvørt vera til sína tíð. Tí eingin megnar alt í senn.

Vit mugu loyva mammum at velja at vera heima ella at arbeiða niðursetta tíð, um tað er tað, tær vilja.

Eitt vælvirkandi heim, har børnini og tey ungu hava tað gott, hevur helst nógv størri týdning fyri samfelagið, enn flestu okkara dagliga geva okkum far um.

Eitt, sum vit hava ov lítið av, er nøgdsemi. Tað er líka við, at fólk ikki fáa frið at vera nøgd. Havisjúkan í okkara burturblakingarsamfelag køvir alt nøgdsemi.

**Øll hava ábyrgd av børnunum**
Børnini eru tað dýrabarasta ikki bara hjá familjunum, men eisini hjá samfelagnum øllum. At gera sterkar og góðar karmar kring barnafamiljurnar gagnar øllum samfelagi okkara. Íløga í tryggan barndóm er besta íløgan fyri framtíðina.

Øll børn eiga at hava tað gott í Føroyum. Og vit hava øll ábyrgd av børnunum í Føroyum.

Fólkaflokkurin vil virka fyri, at peningurin fylgir barninum. Á tann hátt gerst betri javnstøða millum tey yngstu.

# Plagiatflokkarnir



HILMAR AUGUSTINUSSEN
Javnaðarflokkurin

Ella á Føroyskum. "Eftirlíkningsflokkarnir".

Tað kunnu vit í dag seta sum navn á, serliga Sambandsflokkin og Fólkaflokkin.

Teir báðir høgraflokkarnir hava ongantíð havt sosialpolitikk serliga ovarlaga á teirra vælskrá. Teir hava altíð verið flokkarnir fyri tey vælbjargaðu. Tað sum nú er hent er, at fólk byrja at síggja teirra rætta andlit, og so mangla teir okkurt at krógva seg aftan fyri og teir fjaðrarnar lántu ella tóku teir so frá Javnaðarflokkinum.

Vit kundu lesa í bløðunum nú um dagarnar eina grein, sum Eyðun Joensen, fyrrverandi sálarfrøðingur hevði skrivað. Í greinini staðfestir hann, at omanfyri standandi flokkar, sum í farnum árum nýttu vendingarnar "Almennar pottarplantir", "Pamparar", "Hvítkitlar" og annað minni pent um fólkið, sum arbeiðir fyri almennaverkið.

Nú er ikki mørk fyri, hvat teir vilja geva og lova. Men eg haldi ikki, at teir meina nakað við tað.

Taka vit til dømis famøsa svimjihylin í skúlanum á trøðni. Hann er ónýttur í 3 ár. Fyri trimum árum síðani hevði Fólkaflokkurin býráðsformannin í Havn sum nú er skúlastjóri á skúlanum. Teir eiga landsstýrismannin, sum varðar av Landsverk og teir eiga Landsstýrismannin sum varðar av undirvísingarverkinum. Teir høvdu/hava buktina og báðar endarnar. Hvat er gjørt.

Sambandsflokkurin hevur havt ábyrgdina av fiskivinnuni í fleiri ár nú. Nú royna teir so eisini at lána fjaðrar frá Javnaðarflokkinum á sosiala økinum.

Hugsa um tað 19. januar.

# Áðrenn tú setur krossin



EDMUND JOENSEN
Sambandsflokkurin

Tjums!

Valkortið datt inn gjøgnum brævsprekkuna í vikuni. Títt navn stendur á kortinum. Sjónligt prógv um, at nú er tað tú, sum eigur seinasta orðið.

Øll tey politisku orðini eru søgd, boðskapirnir eru bornir, og meiningarnar eru vendar og snaraðar.

Bert eitt er eftir at gera, áðrenn tú setur krossin. Far eina seinastu ferð inn í teg sjálva/n og spyr: Velji eg nú rætt?

Spyrt tú meg, so ætli eg at velja einasta flokkin, sum í praksis hevur prógvað, at hann torir at gera og siga tað, sum vanlig fólk við viti og skili hugsa.

Hesin flokkur tordi at trýsta á búskaparliga speedaran, tá tað kravdist.

Hann tordi at skjóta upp og halda fast um, at Føroyar skuldu gerast eitt valdømi.

Eisini tordi flokkurin at steðga samgongusamstarvinum, tá hundraðtals milliónir av tínum skattakrónum vóru í spæli í Tinginum eitt minniligt kvøld í desember.

Nú vil flokkurin taka fótin av búskaparliga speedaranum, tí búskapurin er ov heitur.

Og hann vil leggja pengar til síðis, nú tíðirnar eru góðar.

Tað er júst sami flokkur, sum vil stýra búskapinum við fastari hond og samstundis broyta kósina nakað, so trivnaður, livikor og útbúgving fáa veruligt pláss í politikkinum komandi árini.

Og sami flokkur, sum ætlar at samstarva tætt við donsku stjórnina heldur enn at standa í túninum uttan fyri Christiansborg og rópa.

Tú veitst ivaleyst hvønn flokk, eg hugsi um.

Hjá mær er nú klárt at taka valkortið og at seta krossin við rættan flokk. Vónandi eisini hjá tær.

Gott val.

# Eg kann vera tín rødd á tingi



ATLI F. JOHANSEN
Valevni Sambandfloksins

Í hesum døgum verður tað tosað nógv um vallyfti. Eg havi einans eitt lyfti, og tað er, at eg fari at lova, at eg skal gera mítt allarbesta, um tú velur at geva mær stuðul á valdegnum.

Eg fari at lurta eftir teimum singnalum man fær frá fólkinum og vinnuni, og síðani tala tykkara søk á tingi.

Eitt greitt singnal frá fólkinum og vinnuni her um leiðir er, at man ynskir at Skálafjarðartunnilin skal byggjast.

Hesum taki eg fult undir við, og ætli eg at gera mítt besta fyri at hetta skal koma ígjøgnum.

Eg trúgvi, at einasta grundin til, at málið um tunnilin ikki kemur fram, er, at tað eru fólk, sum eru bangin fyri, hvussu hetta kemur at ávirka Eysturoyaøkið.

Tað er í Eysturoynni, at stórur partur av føroysku virðunum vera virkaði og við hesum fáa vit vælferð. Uttan virðir og pening – ja, so er eingin vælferð.